# Pastell í nýggjum hami

Nú hevur Pastell í Sandavági skift teir gomlu antikkmøblarnir út við skógvar. Handilin, sum av fyrstani tíð var antikkhandil, er nú broyttur til ein skógva- og stell handil.

Fyri stuttum lótu báðir skógvahandlarnir, sum vóru í Vágum aftur, og hevði hetta við sær, at eigarin av Pastell, Turid Davidsen, fór at hugsa aðrar leiðir við sínum handli, tí hon helt, at ein skógvahandil átti at vera í Vágoynni.

Handilin, har Pastell húsast, er tí júst umvældur og er nú ein sera snotiligur skógvahandil, sum bjóðar skógvar til allar aldursbólkar.

Merkini, sum handilin umboðar, eru Khrio, Bella Moda, Marco Tozzi, Blend, Kawasaki og Kennedy.

Øll merkini eru ikki komin í handilin enn, men eru tó ávegis. Longu nú ber tó til at síggja myndir og bíleggja skógvarnar frá Pastell, áðrenn teir koma til landið. Hetta kann gerast við at vitja heimasíðuna pastell.fo

Pastell er einasta umboð fyri Khrio, Bella Moda og Blend og verða bert fá pør av hvørjari stødd bíløgd heim í handilin, soleiðis at kundin ikki nýtist at verða bangin fyri at síggja fleiri í sama slagi av skóm, sum hann sjálvur.

Pastell selur eisini tað vælumtókta italienska stellið, Deliciouse, frá Rice og har afturat serligt kaffe og te.

Tá ókeypis er at koyra gjøgnum tunnilin kemur nógv fólk á gátt hjá Pastell, og verða tey tá boðin at smakka kaffi, sum handilin selur, og fáa fær okkurt gott aftur við.

Í samband við tunnilsdagin eru góð tilboð í Pastell, og enn er nakað av antikkmøblum í handlinum, og verða teir seldir við 40% í avslátturi.









# Í Beitinum

**Felagshúsini hjá Vága Dansifelag, húsini í Beitinum í Miðvági, hava seinnu árini staðið undir umvæling. Nú er komið so mikið áleiðis, at farast kann undir at fáa innbúgv til vega. Eitt innsavningartiltak verður í Keypssamtøkuni í Miðvági leygardagin 28. februar**

Húsini hjá Vága Dansifelag í Beitinum í Miðvági hava verið gjøgnum eina rættiliga umfatandi og kostnaðarmikla umvæling. Nú byrjar so smátt endi at síggjast á, og eftir er nú at innrætta húsini. Men tað kostar eisini pengar, so nú er at leita eftir einum ella fleiri góðum sponsorum.

Í dansihølinum í neðra er opið upp í tróðrið, sum alt er klætt við timbri, eins og bitarnir eisini eru. Gólv og veggir eru eisini úr timbri.

Í húsinum er ein dansistova, og so er avskildrað inn í køkin, eins og ein lítil gongd inn til wc er beinleiðis úr dansistovuni. Garderoba er í dansistovuni, og eitt goymslurúm inn frá køkinum.

Fyrsta takið verður nú at fáa innbúgv, sum skal vera borð og stólar, í dansistovuna, og køksútgerð so sum ein ella tveir komfýrar við eimhettu, eitt køliskáp og ein mikrobylgjuovn, so farast kann undir at leiga húsið út fyri at fáa nakað av brúkta peninginum innaftur.

Leygardagin 28. februar kl. 09.30 skipar Vága Dansifelag fyri tombola í Føroya Keypssamtøku í Miðvági. Hendan dagin er ókeypis at koyra gjøgnum Vágatunnilin.




